# Um Niels Skaale, mannin sum legði navn til Skálatrøð

Ein partur av hesi søgu snýr seg um Niels Skaale og um Skálatrøð, sum hann seldi til M. C. Restorff. Carolina Heinesen hevði eisini eina frásøgn í samband við Niels Skaale. Hon greiður frá húsunum hjá honum. Hetta lá, har handilin hjá Katrinu Christiansen nú er. Tann fyrsti, sum hevði handil her, var A. W. Restorff, pápi Carolinu. Her er William Heinesen eisini føddur. Aftaná kom Zacharias Heinesen, maður Carolinu, at reka hendan handil.

Um húsini hjá Niels Skaale skrivar Carolina:



*Partur av "Skálatrø", sum ikki er til longur*

## Det gamle Skålehus

Det lå i Bringsnagøta og havde i længst forsvunden tid været beboet af en bartskær. Siden var der en hosetager ved den kgl. Handel, der hed Niels Skaale, som købte huset og boede der med en gammel husholderske, som blev kaldt Muffen. Da Skaale så døde, købte bedstefar både det og Skåletrø.

Mine første erindringer knytter sig til samme hus, da mine forældre boede der, og jeg var kun 2-3 år, da det blev revet ned. Huset var lille og hyggeligt med en stue og to små værelser. Ovenpå var der kun et meget lille værelse, som blev kaldt Muffekammeret, og hvor der vrimlede med lopper. Jeg husker dunkelt Muffen, da hun efter Skaales død boede hjemme hos bedstefar. Hun sad gerne ude ved komfuret, hvor hun indtog sine måltider. Hun var meget gammel og havde altid en blåprikket bomuldskyse på hovedet.

## Um Niels Skaale

Niels Skaale var ættaður av Skála. Hann var sonur Niclas Poulsen og konuna Agn-esse Hansdatter, sum vóru búsett her í Havn í 1850. Hann, konan Birgitte Olesdatter, sum var ættað úr Tjørnuvík, og sonur teirra Joen Pauli Skaale, búðu í húsinum í Bringsnagøtu, aftaná Meistar Júst og Marionnu Hammershaimb. Tá Niels Skaale gjørdist gamal, og konan og sonurin vóru deyð, seldi hann alla ogn sína til M.C.Restorff, sum umframt húsini í Bringsna-gøtu, eisini var tann stóra trøðin nevnd "Skálatrøð", eitt bátaneyst í Rættará og eitt sodnhús úti í Bines kilde ella Mattalág. Arbeiðiskona hansara var Súsonnu Rasmusdatter nevnd "Muffan", sum var dóttir Elsebeth Jacobsdatter og Rasmus Johansen, sum hevði starvast sum soldatur. Muffan varð jarðað í gamla kirkjugarði í Havn 8. mars 1881, 88 ára gomul.

## Keypmannahavnarferðin í 1844.

Oddvør Johansen, oldurabba-dóttir M.C. Restorff, hevur gvið eitt íkast til søguna um sambandið millum Restorff og Niels Skaale.

Niels fór í 1844 eina ferð til Danmarkar, og tað varð greitt frá hesi forvitnisligu ferðini í FF-blaðnum í 2002.

Niels førir dagbók, og her sæst dag fyri dag, hvat ið hann hevur tikist við.

Niels Skaale býr á í Keyp-mannahavn hjá Poul Andreas Jacobsen, skómakarameistara. Hann var ættaður úr Kaldbak, men av tí at hann var føddur við "klumpfóti", fór hann niður til Danmarkar, har hann lærdi til hondskómakara. Hann giftist niðri og hevði heim sítt og virki í Bredgade 209, har hann eisini fekk trý børn millum onnur dóttrina Else Jacobine.

Meðan Niels Skaale er í Keypmannahavn, verður unga Elsa Jacobina trúlovað ungum manni nevndur Martin Christian Restorff, bakari og konditari. Trúlovilsisgildið verður hildið 12. juni 1844, og vit lesa, at 60-ára gamli Niels Skaale m.a. dansar hetta summarkvøldið í keypmannahavnargildinum.

Vit kunnu gita okkum til, at Niels Skaale, ið arbeiddi sum kgl. hosutakari í einahandlinum, her fær hugskotið at biðja tann unga bakaran M.C. Restorff koma til Føroya til handilin, har eingin professionellur konditari hevði verið áður. Hvussu er og ikki, fýra ár seinni flyta M.C. og Elsa Jakobina til Føroya, har tey verða allar sínar dagar. Vit fáa eisini varhugan av, at tað er á hesi danmarkarferð, at eitt lívslangt vinarlag kemur í millum hesar báðar menninar.

At Niels Skaale mundi vera eitt slag av abba í restorffs-húsinum sæst av tí, at tey í 1850 kalla fjórða sonin upp eftir honum, Niels Skaale Restorff. Hesin doyði sum smádrongur.

Árini ganga, og eini tjúgu ár eftir, at Niels Skaale (við táravættum eygum, skrivar hann) biður vinfólkunum í Keypmanna-havn farvæl, kemur hann illa fyri fíggjarliga. Hann hevur nú mist konu og son og grunar einki ilt, fyrrenn hann ein dagin fær tey boð frá Müller, sýslumanni, at Kamarjunkarin Tillisch nú krevur Niels Skaale eftir stórari skuld, sum deyði sonur hansara skuldi skylda Tillisch.

Tað er eitt eyðmjúkt og biðjandi bræv Niels Skaale skrivar Tillischi, har hann býður sær til at rinda helvtina av skuldini aftur. Hann gongur nú á 80-unda ári og kennir seg veikan og biður Tillisch bønliga um at geva sær hina helvtina av skuldini eftir.

Tað hevði verið áhugavert at kent svarið frá Tillisch kamar-junkara. Hetta svar verður okkum ókent. Men hvussu er og ikki, so er tað um hetta mundi, at M.C.Restorff, sum nú hevur bygt upp eitt stórt virki við góðum avkasti, keypir trøðna frá Niels Skaale. Prísurin er 600 ríkisdálar.

Hetta er trøðin, sum til denna dag hevur verið rópt Skálatrøð.

Í nógv ár fanst einki skjeyti upp á hetta keyp. Óndar tungur vildu vera við, at trøðin var brennivínsjørð. Hetta rímar tó illa við mannin Niels Skaale, sum var álitismaður í allar mátar.

So eina ferð fyrst í 1950-unum hendir tað løgna, at faðir mín, Verland Johansen, møbilsnikkari, fær eitt gamalt skrivibord at gera í stand. Undir leðurklaffinum á tí finnur hann ein gamlan konvo-lutt. Í honum liggur skjeytið upp á trøðna, Skálatrøð. Undirskrivað av Niels Skaale sjálvum við segli.

Á gamalsaldrinum fær Niels Skaale tað lyfti frá M.C.Restorff, at hesin frá nú av skal *"foreskaffe mig og min Tjenestepige Susanne Rasmusdatter med alt, hvad vi behøve, det være sig af hvad Navn nævnes kan, indtil min og min tjenestepiges Død, og efter vores Død lade os anstændig begrave.*

*Dette er min sande og alvorlige Vilie, bekræfter jeg med min egen Underskrift og for trykt Seigl."*

M.C.Restorff, sum ikki júst hevði orð fyri at vera smáligur, man hava hildið orð. Niels Skaale liggur grivin undir liðini á konu hansara Else Jacobine Restorff. Gravirnar báðar standa uttan fyri høvuðsdyrnar í Havnar kirkju.

Niels Skaale fekk navn sítt høgt inn í hvíta marmorplátu, sum kirkjufólkini í Havn ganga fram við, hvørja ferð tey fara í kirkju.

## Ískoyti:

Hetta er tað, sum Oddvør skrivar. Tað kann sjálvsagt ikki sigast við vissu um grundgevingina hjá gamla Restorff at lata Niels Skaale ta grøvina, sum annars skuldi verið hansara eftir van-ligari siðvenju, at hjún verða jarðað saman.

Hann kundi saktans latið Niels fingið eina heiðurliga jarðarferð í gamla kirkjugarði, har tað var nógv pláss. Her varð tænastu-gentan Susanne Rasmusdatter eisini jarðað.

Tí er grund til at halda, at M. C. Restorff hevur verið so rætt-skaffin, at hann vildi geva vinmanninum ta mest heiðurligu jarðarferð, sum hann kundi heva honum. Hetta var við at Niels í allar ævir skuldi sleppa at hvíla undir liðini á konu gamla Restorff. Hetta tykist eisini at hava verið í samsvar við ta heiðurligheit, sum gamli Restorff annars vísti í sínum lívi.

Tí er hetta eina sjáldsama góð søga.



*Skeyti undirskrivað 22/10-1862 av Niels Skaale*

*Jeg underskrevne Niels Skaale i Thorshavn har overladt til Hr. Kjøbmand M. C. Restorff efter Skjødet af........................................ min Trøe tillige med de derpaa staaende Bygninger paa den ufravigelige Betingelse, at Hr. Restorff fra Nu af skal foreskaffe mig og min Tjenestepige Susanne Rasmusdatter med alt, hvad vi behøve, det være sig af hvad Navn nævnes kan, indtil min og min Tjenestepiges Død, og efter vores Død lade os anstændig begrave.*
*Dette er min sande og alvorlige Vilie, bekræfter jeg med min egen Underskrivt og for trykt Seigl.*

*Thorshavn, den*
*N. Skaale.*

## Næstu ferð

**Í komandi viku verður greitt frá hjúnunum Evu og Andreas C. Lützen. Dóttir teirra Anna skrivar, at pápin fekk ein vakran deyða, nevniliga við kongsins hond í síni.**